# Kjak



**Jógvan Arge,**
*formaður í mentamálanevndini í Havn*

## Neistahøllin í Vesturbýnum

Nú eru loksins útlit til, at ein harðliga tiltrongd ítróttarhøll verður bygd í Vesturbýnum í Havn. Eftir sjey ára togan hevur Tórshavnar býráð nú samtykt at játta hondbóltsfelagnum Neistanum ein leigusáttmála fyri lendi úti við Skeivu træbrúgv á Landavegnum at byggja eina einstaka høll á.

Toganin hevur eitt nú staðið um, antin byggjast skuldi ein vanlig einkult ítróttarhøll ella ein størri høll. Neistin hevur boðið seg fram við eini áhugaverdari miljónmaupphædd at byggja høllina, men teirra útgangsstøði hevur verið ein einkulthøll, meðan annað sjónarmið hevur verið at byggja størri høll.

Tann vansin hevur verið við hesum, at so fór projektið hjá felagnum Neistanum fyri bakka, og Neistin kom sum fráleið at stríðast við ein eigara aftrat, og vit vita jú, at tað kemur sjáldan nakað gott burtur úr at hava fleiri harrar í sama húsi.

Tí er tað sera hugaligt, at eitt einmælt býráð við øllum trettan atkvøðum fyri og ongari ímóti samtykti at gera leigusáttmála um lendi til eina einkulthøll í Vesturbýnum.

Tað er sera sjáldsamt, at eitt felag kemur sjálvboðið við eini miljónaupphædd til eina byggiætlan. Neistin hevur í fleiri ár havt einar sjey-átta milliónir tøkar til byggingina. Nú hevur felagið hækkað sín innsats til 10 milliónir krónur, sum svarar til 40 prosent av metta kostnaðinum.

Siðvenjan var, at kommunurnar stuðlaðu slíkum ætanum við 30 prosentum og landið við 30 prosentum. Tórshavnar kommuna hevur fyri árum síðani samtykt at játta síni 30 prosent, men verri hevur gingið við landinum. Seinastu boðini, sum Neistin hevur fingið haðawni, eru, at felagið fær ikki stuðul frá landinum til sína hallarbygging.

Tá tú hevur skoðað leikin, sum tryggjaði Klaksvík eina høll aftrat partvís gjøgnum landskassan og seinni hevur verið vitni til leikin um ítróttarhøllina á Sandi, sum landið skal rinda alla, sum hon er, er tað kanska ikki so løgið, at tey, sum liva og búgva í Havn, kenna seg ikki sørt stoytt. Tey liva eisini í Føroyum.

Tað hevur Tórshavnar Býráð eisini tikið støðu til. Býráðið hevur við undirtøku frá hvørjum einasta býráðslimi samtykt at játta Neistanum ein meirstuðul, so felagsins hugaliga ætlan ikki fer fyri bakka, men verður framd.

Hesin stuðul er 7,75 mió kr, og svarar til tað, sum Neistin og kommunan væntaðu, at Neistin fór at fáa frá landinum á sama hátt, sum onnur plagdu at fáa. Afturfyri stuðulin fær kommunan ávís rættindi og veð í høllini, so vissa er fyri, at skattaborgarans peningur er væl farin.

Hallarbyggingin er alneyðug. Trongt er í øllum hallum í Havn. Tað darvar ítróttamenningini og trivnaðarmøguleikunum, og tí fremur Neistin eitt óhoyrt og kærkomið átak við síni høll.

Tað dámar kommununi væl. Vit síggja fram til gott samarbeiði við Neistan um høllina, sum sera skilagott verður bygd í tí ítróttaliga ongan-manna-landinum vesturi í býnum, har hon óivað fer at dugna bæði havnarfólki, heimanfólki og argjafólki.



**Halla Samuelsen, býráðslimur**
*forkvinna í sosialu nevnd*

## Vóni at spakin verður settur í í november

– Hetta var rættasta loysnin, at tey, sum vóru við í prekvalifikasjónini fáa ein møguleika at koma við nýggjum tilboðum innan 1. september. Eg eri so mikið bjartskygd at eg trúgvi, at spakin verður settur í í november, sigur Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd.

Meirilutin í bygginevndini hjá Tórshavnar kommunu mælti herfyri frá at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum at byggja ellis- og røktarheim Yviri við Strond, tí øll teirra hava grundleggjandi manglar í mun til byggiskránna og myndugleikakrøv, sum gera, at tað er ikki ráðiligt at realisera nakað av uppskotunum á fyriliggjandi grundarlagi.

Ein meiriluti í fíggjarnevndini samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við samtyktini hjá sosialu nevnd við nøkrum tekniskum broytingum. Hetta samtykti býráðið við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

- Nú sleppa teir sum vóru við í prekvalifikasjónini at arbeiða víðari og koma við nýggjum tilboðum innan l. september. Eg haldi hetta var tað rættasta at gera, tí veruleikin var jú, at uppskotini ikki svaraðu galdandi myndugleikakrøvum. Nú fáa øll ein møguleika at royna umaftur ístaðinfyri, at vit fara at velja ein burturúr. Eg eri so mikið bjartskygd, at eg trúgvi, at vit seta spakan í í november í ár, sigur Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd, í stuttari viðmerking.

# G! Festival í Financial Times um vikuskiftið

Kenda enska blaðið Financial Times hevði leygardagin grein um G! Festival, har G! verður hildið upp sum alternativ til størsta bretska festivalin, Glastonbury, sum júst hetta vikuskiftið hevur 150.000 vitjandi.

Greinahøvundin, Paul Sullivan, sum var á G! í 2007, sigur, longu fyrstu ferð hann var á Glastonbury, visti hann, at hann ongantíð ætlaði sær har aftur. Innan fáar tímar hevði hann mist bæði tjald og vinir burtur og tá náttin kom, noyddist hann sova á berum millum tjaldpelar og sløðd klæðir. Tíbetur finst eitt alternativ, sigur hann, og vísir til G! Festival, 800 míl norðanfyri Glastonbury, á kantinum av Europa, í eini lítlari bygd út móti havinum, við einans 500 íbúgvum. Sullivan hevur tosað við Jón Tyril, sum sigur at nakað av tí besta G! hevur at bjóða, er tættleikin, kenslan av at vera vælkomin og teir vinaligu festivalgestirnir. Sjálvur heldur Paul Sullivan tað mest einastandandi við G! vera staðið, har festivalurin er. Samanrenningin av grønu fjøllunum, skyggjandi bláa havinum og teimum fittu flætaktu húsunum er idylliskt, heldur Sullivan. Sum heild hevur høvundin nógv gott at bera G! Festival og Føroyum í greinini, og nevnir hann m.a. matin, Føroya Bjór, Teitur, Eivør og Boys in a Band.




Hóast G! er einastandandi á mangan hátt, so er tað ein partur av einum størri ráki mótvegis smærri festivalum longur burturi frá meginøkjunum. Onnur dømi eru Loopallu í Ullapool í Skotlandi og Træna í norður-noregi. Tað allar besta við slíkum festivalum er sambært Sullivan, at tá ljósini sløkna, so er tað altíð møguligt at finna sítt telt aftur.

Greinin er bæði í prent- og í netútgávuni av Financial Times. Paul Sullivan hevur fyrr skrivað um G! Festival í The Guardian.

Les greinina <a href=http://www.ft.com/cms/s/2/c78c5bb0-7fdf-11df-91b4-00144feabdc0.html>við at TRÝSTA HER</a>